UTTAN ÚR HEIMI

## Stórur áhugi fyri oljuleiting

Áhugin fyri at leita eftir olju í bretskum og norskum sjógvi er sera stórur, og hann tykist veksa støðugt.

Tá bretar herfyri høvdu eitt nýtt útbjóðingarumfar, vóru tað ikki færri enn 68 feløg, sum søktu um at fáa leitiloyvi, og tá norðmenn seinast høvdu eitt útbjóðingarumfar, lógu 16 feløg framvið. Hetta merkir kortini ikki, at áhugin fyri tí norska økinum er so nógv minni, og fyrradagin vóru 14 feløg á fundi við norska oljumálaráðharran, Thorhild Widvey, har tey bóðu um at verða góðkend til at leita eftir olju og gassi í norskum øki, skrivar Aftenposten. Tey 14 feløgini hava bretska góðkenning, men ikki norska.

Thorhild Widvey sigur við blaðið, at higartil eru tað yvirhøvur norsk og stór altjóða oljufeløg, sum hava fingið leitiloyvi í norskum øki, men at stjórnin kortini hevur áhuga í at tosa við tey smærru feløgini eisini. Hetta er ein liður í arbeiðinum at marknaðarføra tað norska økið, sigur hon.

## Lurtaðu eftir telefonini

Finska løgreglan kannar nú, um telefonfelagið Sonera fór út um lógarinnar mark, og um trygdarløgreglan hjálpti felagnum, tá tað fyri fýra árum síðani kannaði, um nakað av starvsfólkunum hevði avdúkað innanhýsis viðurskifti.

Upprunin til kanningarnar eru nakrar greinar í blaðnum Helsingin Sanomot, sum vildi vera við, at trygdarløgreglan SUPU hevði hjálpt Sonera. Millum annað visti blaðið at siga, at Sonera hevði avlurtað telefonir og fartelefonir hjá fleiri starvsfólkum í leiðsluni, og blaðið skrivaði eisini, at Sonera hevði avlurtað telefonina í tænastubilinum hjá Paavo Lipponen, forsætisráðharra.

Kanningar hava síðani víst, at telefonirnar hjá meiri enn 60 fólkum vórðu avlurtaðar, og málið hevur longu elvt til nakrar uppsagnir í Sonera. Men ákæruvaldið hevur eisini sett sær fyri at kanna, um leiðslan í trygdarløgregluni var uppi í málinum, og sambært finsku tíðindastovuni er nógv, sum bendir á, at leiðslan visti, hvat fór fram, og at hon hjálpti Sonera við avlurtingini.

## Ov nógvar myntir

Felags evropeiska gjaldoyrað, evran, hevur yvirhøvur roynst væl, síðani hon kom í gildi í teimum flestu ES-londunum, men nú vísir tað seg kortini, at tær nógvu myntirnar eru ein trupulleiki.

Tær minstu myntirnar eru ein og tveir cent, sum svara til ávikavist umleið sjey og fjúrtan oyru, og nógvir ES-borgarar halda tað vera óneyðugt at hava so smáar myntir. Nógvir handlar hava gjørt sær dælt av skipanini og hava tí prísir sum 1,98 evru, men brúkararnir vilja heldur hava prísin upp á 2,0 evrur enn at dragast við tær smáu myntirnar.

Í Finnlandi tóku myndugleikarnir atfinningarnar í álvara beinanvegin, so har hava fólk ikki brúkt tær smáu myntirnar seinastu tvey árini. Niðurlendingar hava gjørt av at strika tær minstu myntirnar frá 1. september í ár, og tað hevur fingið evropeiska míðbankan at umhugsa at gevast við at gera myntir, sum eru ein og tveir cent, skrivar DPA.

## Ølsvik

Eins og aðrastaðni er alkoholinnihaldið avgerandi fyri, hvussu nógv svenskir innflytarar skulu rinda í avgjaldi, tá teir keypa øl úr útlondum. Men nú hava teir funnið upp á ráð.

Blaðið Metro skrivar, at tað hendir meiri enn so, at innflytarar merkja ølið til at hava 3,5 prosent av alkoholi, sjálvt um tann veruliga styrkin bara er 2,8 prosent. Í tollvaldinum vátta tey upplýsingarnar. Thomas Lindgren í tollvaldinum sigur við Metro, at tað eru serliga innflytarar í Stockholm og Malmø, sum fáa teir útlendsku sølufyritøkurnar at seta skeiv merki á ølið, áðrenn tað kemur til Svøríkis.

Sambært Metro loysir tað seg væl hjá innflytarunum at svika við styrkini, tí avgjaldið fyri eina øl við 2,8 prosent alkoholinnihaldi er hálva triðju krónu minni enn fyri eina øl, sum hevur 3,5 prosent av alkoholi.

# Russar siga ikki sannleikan um flogvanlukkurnar

**Russisku myndugleikarnir halda framvegis uppá, at talan var um tvær vanlukku, tá tey bæði flogførini duttu niður mikunáttina. Men altjóða serfrøðingar halda, at russar lúgva**

RUSSLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Fleiri serfrøðingar ivast í, at russar siga sannleikan um tey bæði flogførini, sum duttu niður mikunáttina*

Í gjár vildi ovastin í russisku trygdartænastuni FSB (fyrr KGB) vera við, at vánaligt viðlíkahald var orsøkin til, at tey bæði Tupolev-flogførini duttu niður mikunáttina. Stutt eftir vanlukkurnar vildu aðrir myndugleikar vera við, at flogførini kundu hava fingið skeivt brennievni, áðrenn tey fóru úr Moskva.

Men serfrøðingar ivast í teimum russisku frágreiðingunum.

– Eg veit ikki um nakað fordømi, har tvey flogfør eru farin av sama flogvølli um somu tíð við næstan somu kós og eru dottin niður um somu tíð. Umstøðurnar tala eisini fyri, at hetta var yvirgangur. Russland hevur fingið fleiri hóttanir um yvirgang, val verður í Kekenia skjótt, og Putin, forseti, var í Sosji við Svartahavið, hagar annað flogfarið skuldi. Nei, hetta boðar ikki frá góðum, sigur bretski flogtrygdarserfrøðingurin Mike Boyd við BBC.

Danskir loftferðsluserfrøðingar siga tað sama. Ein talsmaður hjá Statens Luftfartsvæsen segði við danska sjónvarpið mikukvøldið, at hann hevur heldur ongantíð hoyrt, at tvey flogfør, sum fóru úr somu flogstøð um somu tíð, eru dottin niður um somu tíð fyrr.

### Dylja yvirgang

Russiskir serfrøðingar siga seg hava illgruna um, at myndugleikarnir royna at venda orðaskiftinum burtur frá yvirgangi, tí at val verður í Kekenia í næstu viku, og at myndugleikarnir tí vilja sleppa undan ófriði har. Tað er eisini umráðandi, siga teir og vísa á, at týsdagin skulu kekenar velja nýggjan forseta fyri Akhmad Kadyrov, sum doyði í einari yvirgangsatsókn í mai.

Fyrr hava teir russisku myndugleikarnir annars verið skjótir av geva teimum kekensku uppreistrarmonnunum skyldina av yvirgangi í Russlandi. Men hesaferð er øðrvísi, og harafturat hava uppreistrarmenninir avsannað, at teir høvdu nakað við vanlukkurnar at gera.

Eygleiðarar hava tó bitið merki í, at samsvar er ikki ímillum tað, sum myndugleik-arnir siga, og tað, sum flogfelagið Sibir hevur sagt. Hetta felagið átti tað flogfarið, sum var á veg úr Moskva til Sosji, og felagið hevur sagt, at tað hevur ábendingar um, at ein spreinging var umborð á flogfarinum.

Um hitt flogfarið hava vitni greitt frá, at tey hoyrdu eina spreinging, áðrenn flogfarið datt niður. Myndugleikarnir hava eisini sagt, at vrakpettini av hesum flogfarinum lógu spjadd um eitt ógvuliga stórt øki, og tað kundi bent á, at tað sprongdist í luftini, siga teir.

# Órinið tikið frá Pinochet

**Líkt er nú til, at fyrrverandi einaræðisharrin í Kili kortini verður drigin fyri rættin fyri tey mongu brotsverkini, sum stýri hansara framdi**

KILI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Augusto Pinochet*

Hægstirættur í Kili hevur ógildað órinið hjá fyrrverandi kilska einaræðisharranum Augusto Pinochet. Rætturin var kortini ikki samdur um avgerðina, tí átta av teimum seytjan dómarunum atkvøddu ímóti.

Avgerðin ber í sær, at Pinochet kann dragast fyri rættin í sambandi við, at umleið 3.000 av hansara politisku mótstøðumonnum hvurvu ta tíðina, hann sat við valdið frá 1973 til 1990. Fleiri sakførarar hava leingi roynt at fáa hann fyri rættin, men tað hevur ikki borið til, tí órin hansara sum fyrrverandi forseti hevur forðað tí. Harafturat hevur Pinochet leingi verið sjúkur, og læknar hansara hava eisini sagt, at hann er ov veikur til at koma fyri ein dómstól.

Reuter skrivar úr Santiago, at avgerðin hjá hægstarætti hevur býtt kilska fólkið sundur í tvey. Øðrumegin eru tey, sum vilja draga hann til svars fyri illgerðirnar hjá hernaðarstýrinum, og hinumegin eru tey, sum rósa honum fyri tey búskaparligu framstigini, sum hendu undir stýri hansara.



# Mikkjal takkar fyri seg

**Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, sigur, at útvarpsstjórin, Jógvan Jespersen alt fyri eitt tekur við stjórasessinum í SVF, sum 1. januar skal leggjast saman við ÚF**

UPPSØGN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Tað kendist løgið, tá samanleggingin av ÚF og SvF varð kunngjørd. Síðan hava eg summað meg, og hugsað um støðuna. Niðurstøðan varð, at tað var frægast hjá mær at siga meg úr starvi. Nú avgerðin er endaliga tikin, kennist tað sum ein lætti, sigur Mikkjal Helmsdal, ið hevur verið stjóri í SvF seinastu trý árini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tá starvsfólkini í Sjónvarpi Føroya koma til arbeiðis mánadagin verður eingin Mikkjal Helmsdal at finna á stjóraskrivstovuni.

Stjórin í Sjónvarpi Føroya seinastu trý árini hevur sagt seg úr starvinum frá 1. september, og fríggjamorgunin boðaði Mentamálaráðið frá, at uppsøgnin er góðtikin.

– Tað kendist løgið, tá samanleggingin av ÚF og SvF varð kunngjørd. Síðan hava eg summað meg, og hugsað um støðuna. Niðurstøðan varð, at tað var frægast hjá mær at siga meg úr starvi. Nú avgerðin er endaliga tikin, kennist tað sum ein lætti, sigur Mikkjal Helmsdal.

1. januar er ætlanin at leggja Sjónvarp- og Útvarp Føroya saman í ein stovn. Stjórasessin í SvF frá 1. september skal útvarpsstjórin Jógvan Jespersen røkja, sum eisini hevur fingið ábyrgdina av samanløgdu stovnunum eftir 1. januar.

– Hetta verður sami leistur sum tá Tróndur Djurhuus gavst í Sjónvarpinum. Eins og tá verður Jógvan Jespersen stjóri á báðum stovnum, áðrenn hann formelt tekur við 1. januar, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Eingin meining

Í tíðindaskrivi til fjølmiðlarnar fríggjadagin sigur Mikkjal Helmsdal, at hann sær onga orsøk til at halda fram í stjórasessinum í SvF til 1. januar. Hann sigur seg ikki vilja standa í vegin fyri ella seinka tillagingina av fráboðaðu samanleggingini av ÚF og SvF.

– Eg meti, at tað í longdini tænir starvsfólkunum í Sjónvarpinum og tryggleikanum í dagliga arbeiði teirra best, um tann tilgongd, sum óafturvendandi er sett út í kortið, sleppur í gongd skjótast gjørligt og tann leiðsla, sum Mentamálaráðið ætlar skal taka sær av dagligu viðurskiftum hjá starvsfólkunum frameftir, sleppur til verka sum skjótast, vísir Mikkjal Helmsdal á í tíðindaskrivi.

Spurdur, hvat hann nú fer at takast, svarar fyrrverandi sjónvarpsstjórin, at fyrstu vikurnar fer hann at taka sær av løttum, áðrenn nøkur avgerð verður tikin um framtíðina.

Karl Christiansen, OptimAir Føroyar:

# Rein luft er sunn fornuft

**Tubbaksroykur, dust, og ring inniluft er ein stórur trupulleiki, sum hevur við sær høvuðpínu, kvalma, og fólk hava ringt við at savna seg, sigur Karl Christiansen, sum umboðar OptimAir luftreinsiskipanir í Føroyum**

LUFTREINSING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Karl Christiansen, sum umboðar OptimAir-luftreinsiskipanir í Føroyum, vísir her munin millum eitt reint og eitt skitið filtur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Rein luft er sunn fornuft, sigur Karl Christiansen, umboðsmaður fyri OptimAir Føroyar. Hóast luftdálking fær tey flestu okkara at hugsa um skorsteinar, útstoyt á bilum, osandi verksmiðjur o.l., so eru trupulleikarnir av luftdálkingini innandura ofta verri enn teir, vit uppliva úti og í náttúruni, hetta kemst partvís av, at húsini sum verða bygd nú eru sera tøtt.

Vón er fyri framman hjá teimum sum hava trupulleikar við ringari inniluft, sigur Karl Christiansen.

Ein luftreinsari er ikki ein ventilatión, men eitt tól sum reinsar luftina optimalt, hetta verður gjørt við serligari tøkni, stutt sagt einum elektriskum filtri íð fangar alt dustið, og einum kolfiltri sum millum annað tekur royk og lukt.

Luftreinsarin verður settur til eina vanliga stikkkontakt og skrúvaður upp á veggin við tveimum skrúvum, tað er alt. Teir kosta millum 12-16.000 krónur. Hetta er lítið í mun til, hvat t.d. ein ventilatión kostar.

Karl Christiansen sigur, at ein OptimAir luftreinsari er lættur, líka ljóðleysur sum ein telda, og brúkar tað sama av streymi sum ein vanlig pera, og er so gott sum útreiðsluneutralur eftir keyp.

Luftreinsarin reinsar luftina fyri dust og bitlar frá teldum, og har sum t.d. roykt verður. Skipanin er væl egnað bæði á skrivstovum, stovnum, heima við hús, hjá astma/allergikarum, og umborð á skipum.

Ein OptimAir luftreinsari er settur upp á bilstøðini Auto í Havn við sera góðum royndum, serliga í biðirúminum har tað verður roykt.

Karl heldur hetta verða sera spennandi at fáast við, tí tað gongur ikki bert út uppá at sleingja okkurt í høvdið á fólki, og so fangar borði, nei her snýr tað seg um vælnøgdar kundar, ella gongur tað snøgt sagt ikki, hann heldur skemtandi fram, at hann selur reina luft, betri heilsu, og færri sjúkradagar, tað skuldi sagt eitt sindur.

Optim Air er eitt danskt produkt, og royndir frá nógvum donskum fyritøkum sum hava hesar skipanir, vísa, at í flestu førum bliva tey starvsfólk, sum hava heilsutrupulleikar av ringari inniluft, heilt frísk og trívast betri á arbeiðsplássinum.

Sum nakað forkunnugt í Føroyum, ber til at royna luftreinsarin í einar 10 dagar ókeypis og óbindandi.

Karl Christiansen hittist á tel. 505555 ella 311870. Áhugaði kunnu eisini fara inn á heimasíðuna: www.luftrenser.dk.

## Føroyingur á meginlandinum

Føroyski Hans Petur Hansen hevur seinastu níggju árini búleikast í Danmark, og millum annað hevur hann her havt tónleiki sum ítriv.

Hetta hevur so higartil leitt hann til bólkin, Fastland, har hann er ein av trimum limum. Og nú hevur bólkurin so givið út fløgu, sum er nevnd, Vennerne og jeg.

Talan er um melodiøsan popp-tónleik, har tað ikki er heilt frítt við einum lítlum rock-ísletti, og hóast tað sjáldan ber til at siga, nær talan er um ein bólk, sum veruliga slær ígjøgnum, so ber í øllum førum ikki til avskrivað Fastland framman-undan.

-jm

## Høgni Lisberg á ferð í Sveis

Í døgunum, 2. til 10. september, fara Høgni Lisberg og bólkur hansara á konsertferð í Sveis.

Byrjað verður í Lüzern, har spælt verður á einum av kendu spælistøðunum í Sveis, Schuur, og síðani gongur slag í slag. 3. september verður spælt á Music Culture Club í Fraueenfeld, 4. september verður spælt unplugged í Tonart CD Shop í St. Gallen, áðrenn kvøldið býður á framførslu í Hafenbuffet í Rorschach. 5. september veður talan um unplugged í Sommercasino Tresor í Basel og 9. september verður tað somuleiðis unplugged í Habsburg, Widnau.

Leggjast skal afturat, at tá talan er um unpluggeð framførslur, verður Høgni Lisberg einsamallur á palli.

-jm